# Nýggjur Renault Laguna í Frankfurt

**Renault hava fleiri nýggjheitir á stóru bilaframsýningini, sum verður í Frankfurt í september. Ein av hesum er ein heilt nýggjur Renault Laguna, ið er nakað størri og rúmligari enn forgangarin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ein heilt nýggjur Renault Laguna kemur á marknaðin fyrst í 2008. Talan er um ein bil, ið eins og forgangarin kemur bæði sum sedan og stationcar.

Við eini longd upp á 4,69 m er nýggi Laguna 10 cm longri enn forgangarin og eisini rúmligari. Designið er eyðkent Renault og minnir nakað um Renault Mégane í sedan útgávuni.

Seinastu nógvu árini hava Renault fingið toppkarakter í evropeisku EuroNCAP krasj- og trygdartestum, og sambært Renault eru bæði aktiva og passiva trygdin í nýggja Laguna millum tær bestu í klassanum.

Laguna fæst frá byrjan av við fleiri bensin- og dieselmotorum í ymiskum støddum, m.a. 2.0 dCi (diesel) frá 130 til 175 hk umframt einum sera økonomiskum og umhvørvisvinarligum 1.5 dCi motori við 110 hk og koyrir 19,6 km/l. Allir motorarir eru umhvørvisvinarligir og lúka tey strangastu ES-krøvini um dálking..

Nógv er gjørt burturúr kvalitetinum, og komfortinum er á høgum støði. Nýggi Laguna hevur heimspremieru í bilaframsýningini í Frankfurt í september og kemur í marknaðin fyrst í 2008, verður sagt í tíðindaskrivi frá Renault.



*Nýggi Renault Laguna hevur heimspremieru í Frankfurt í september*


*Laguna hevur sermerkt Renault design*


*Innan er nýggi Laguna ein luksusbilur við øllum teimum mest framkomnu hentleikunum*


*Laguna Sport Tourer er stationcar útgávan av Laguna*

# Audi minibilur

Audi fáast skjótt í øllum støddum frá A1 til A8. Eftir ætlan skal nýggi minibilurin Audi A1 frumsýnast á Tokyo Motor Show í oktober, men roknað verður við at hann eisini verður at síggja á Frankfurt Motor Show í september.

Talan er um ein smartan bil við sermerktum designi - stórum kølaragittari og lágum rútum. Designið minnir eitt sindur um tann fyrra Audi TT. Bilurin verður í sama klassa sum t.d. Mini, sum BMW eiga. Audi A1 kemur eftir ætlan á marknaðin í 2009.



*Audi koma nú við nýggja minibilinum Audi A1, sum verður sýndur fram á altjóða bilaframsýningum í heyst*


Suzuki Liana til sølu
Suzuki Liana 1,6 S, árg. 2006 Km. 30.000
4 píkadekk við alufelgum fylgja við
**Prísur: 149.000**
**Áhugað kunnu ringja á tel. 235910**